# Skjótt hvønn vegin



*Magnus Gunnarsson*
*blaðmaður*

Nú yvir eitt ár er liðið síðan ógvusliga fíggjarkreppan loypti hvøkk á allan heimin, er ómetaliga nógv hent innan altjóða bilaídnaðin. Sølan av bilum steðgaði so at siga upp, og gigantiskar bilkonsernir syndraðust, bilmerkir skiftu eigara, og nøkur fingu mønustingin.

Tað sær tó ikki út til at bilaídnaðurin hevur mist mótið. Í fjør vóru fleiri stórar bilframsýningar avlýstar, men í ár eru allar tær vanligu framsýningar við aftur, og nógvar nýggjheitir verða presenteraðar.

Í blaðnum hava vit frásøgnir frá bilaframsýningini Biler i Bella á Bellasentrinum. Hóast tann framsýningin ikki er av teimum størstu í altjóða høpi, vóru fleiri nýggjheitir sýndar fram eins og bilar, sum verða drivnir av alternativari orku.

mg



*Nýggi Saab 9-5 bleiv presenteraður á bilaframsýningini í Bella*

**BILAR – serblað í Sosialinum mai 2010**

**ÚTGEVARI**
Sp/f Sosialurin

**BLAÐFÓLK**
Magnus Gunnarsson
*maggi@sosialurin.fo*

**MYNDAFÓLK**
Jens Kristian Vang
Álvur Haraldsen
Birgir W. Høgnesen
Magnus Gunnarsson

**LÝSINGAGERÐ**
Kári við Rættará

**PRENT**
P/F Prentmiðstøðin

Síðan 1995 hevur Sosialurin havt fastan bilteig í blaðnum. Teigurin er í blaðnum hvørja viku. Endamálið er m.a. at kunna um tað sum rørir seg á bilamarknaðinum, bilsøgu og um ferðslutrygd.

Síðan 2000 hevur Sosialurin á hvørjum ári givið út serblað um bilar.

© Sosialurin 2010



lív.fo

## Vælkomin til eitt nýtt LÍV

**Stig 1: Vit taka okkum av tínum pensjónspappírum**
- so kanst tú lesa tey, tá ið tú vilt

Pensjón er nakað, ið skal vera í tryggum hondum, uttan at tær nýtist at gera nakað hóvasták. Vit hava sett okkum fyri at geva kundum okkara betri innlit í, hvørji útlit teirra eru. Tí eru vit farin undir eina tilgongd, ið stigvíst ger tað lættari hjá tær at fáa yvirlit yvir tína pensjón.

Í fyrsta stigi hava vit lagt tíni pensjónspappír út á okkara kundaportal. Harvið sleppur tú undan at hava skjølini í tjúkkum ringbindum. Ístaðin fert tú inn á liv.fo og fært lættari, skjótari og betri innlit í, hvussu tín pensjón er skipað. Alt er lagt fram – lætt og greitt.

| Stig 1 | Stig 2 | Stig 3 | Stig 4 | Stig 5 |
|---|---|---|---|---|
| Kundaportalur | Seniorskipan | Marknaðarrenta | Frítt íløguval | Pensjónsnýskipan |

Innlit í útlit LÍV